# Berti fær av at vita

**Týski landsliðsvenjarin hjá Skotlandi fær harða viðferð frá landsmonnum sínum, men sjálvur tykist hann hugsa meira um skaðatrupulleikarnir, sum hópur hansara dregist við**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Berti Vogts hevur sum kunnugt fingið eina serstaskliga vánaliga byrjan sum skotskur landsliðsvenjari, og umframt skotsku miðlarnar, fær hann nú eisini av at vita frá tveimum fyrrverandi týskum stórspælarum.

Teir báðir týskararnir eru Paul Breitner, sum skeyt eitt mál í HM-finaluni í 1974, tá Týskland – við Vogts á liðnum – gjørdist heimsmeistari, og so núverandi týski landsliðsvenjarin, Rudi Völler, sum undir Vogts spældi 21 landsdystir.

Um tað vera í bólki við Skotlandi sigur Völler, at hetta ikki er nakað, sum nervar teir.

- Berti og skotska lið hansara eru als ikki nakað, sum vit hugsa um. Vit ivast ikki eina løtu í, at vit vinna bólkin.

Og meðan Völler tosar meira um egnan mátt, er Paul Breitner meira eirindaleysur í sínum skoðsmáli.

- Berti fer uttan iva at hoykna undir trýstinum frá fjølmiðlunum. Nøkur fá tap afturat. So er hann farin í søguna, heldur Breitner, sum í dag er klummuskrivari og sjónvarpsfrásøgumaður.

### Týðandi avboð

Sjálvur tykist Vogts tó ikki at hugsa so nógv um, hvat teir báðir landsmenninir siga. Hann hevur í so máta nóg mikið at hugsa um, nú fleiri skaðar darva fyrireikingunum hjá skotska landsliðnum.

Tað hevur leingi verið greitt, at hvørji Tottenham-málverjin, Neil Sullivan ella álopssinnaði Don Hutchinson úr Sunderland fóru at vera viið í hópinum, og nú eru teir 25, sum vóru úttiknir, skorðnir niður í Hópurin, sum upprunaliga taldi 25 mans, er nú skorin niður í 21, men enn hevur Vogts ikki gjørt av, hvørjir teir seinastu 18 verða. Scott Gemmil (Everton), Dominic Matteo (Leeds) og Derek McInnes (WBA) hava allir givið avboð vegna skaða, og Robbie Stockdale úr Middlesbrough verður heldur ikki við á ferðini, tí skaðar hava darvað honum ov nógv í fyrireikingunum.

Allir fýra teljast teir annars millum stinnastu leikararnar hjá Skotlandi, so einki er at ivast í, at Vogts er harmur um missin av teimum, og hartil hava báðir miðvallarovastarnir, Paul Lambert og Barry Ferguson, drigist við skaðar, men roknað verður tó við, at teir verða tøkir. Viðvíkjandi teimum báðum miðvallarunum verður annars sagt úr skotskum miðlum, at teir eru sissaðir nakað, eftir at Vogts eftir tapið fyri dønum hevði funnist at teimum, tí teir ikki gjørdu nóg nógv um seg á miðvøllinum.

Skotski hópurin, sum eftir øllum at døma fer at telja 21 mans á føroyaferðini, framgongur verður sostatt hesin:

**Málverjar:**

| Navn | Felag | dystir/mál |
|---|---|---|
| Neil Alexander | Cardiff City | 0/0 |
| Robert Douglas | Celtic | 4/0 |
| Paul Gallacher | Dundee United | 1/0 |

**Verjuleikarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Graham Alexander | Preston NE | 5/0 |
| Stephen Crainey | Celtic | 3/0 |
| Christian Dailly | West Ham | 36/3 |
| Maurice Ross | Rangers | 4/0 |
| David Weir | Everton | 36/1 |
| Lee Wilkie | Dundee | 2/0 |

**Miðvallarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Barry Ferguson | Rangers | 11/1 |
| Paul Lambert | Celtic | 31/0 |
| Kevin McNaughton | Aberdeen | 2/0 |
| Gary Naysmith | Everton | 7/0 |
| Scott Severin | Hearts | 5/0 |
| Gareth Williams | Nottingh. Forest | 4/0 |

**Álopsleikarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Stephen Crawford | Dunfermline | 0/0 |
| Paul Dickov | Leicester | 0/0 |
| Scott Dobie | WBA | 4/1 |
| Allan Johnston | Middlesbrough | 17/2 |
| Kevin Kyle | Sunderland | 4/1 |
| Steven Thompson | Dundee | 4/1 |






Berti Vogts:

# Longu tapt fyrsta dystin

**UEFA sópaði kæruna hjá skotska landsliðsvenjaranum av borðinum, tá hesin vildi hava landsdystin móti Føroyum leiktan á Tórsvølli**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Mikumorgunin visti Útvarpið at siga, at skotski landsliðsvenjarin, Berti Vogts, hevði kært sína neyð um komandi landsdystin fyri UEFA.

Hann helt tað vera púrasta burtur úr vón og vit, at Skotland skuldi spæla dyst móti Føroyum á Svangaskarði, heldur enn at avgreiða dystin í Havn, og hetta vildi hann hava UEFA at taka støðu til.

Hjá UEFA var tó eingin pardón. Tofta Leikvøllur hevur langt síðani fingið sína altjóða góðkenning, so tað var ikki meira enn umsitingin kveitti at skotsku kæruni, áðrenn hon varð avvíst. So longu áðrenn skotski hópurin er komin til Føroya, tykist landsliðsvenjarin hava tapt fyrsta slagið.

### Flytir fokus

Fyri føroyingar kann tað helst tykjast heldur margháttligt við hesi kæruni hjá Vogts, og í besta føri er henda helst grundað á, at maðurin ikki veit, hvat hann tosar um.

Føroyar hava seinastu 10 árini leikt landsdystir á Svangaskarði, og tað fara vit helst eisini at gera framyvir. At Tórsvøllur – sum heldur ikki er endaliga liðugur enn – er komin, broytir valla nakað í so máta, tí longu fyri tveimum árum síðani gjørdi FSF greitt, at teir ætlaðu sær at gera nýtslu av báðum leikvøllunum framyvir.

Meira sannlíkt er tó, at Vogts við hesum royndi eitt slag av psykologiskari krígsførslu móti føroyingum. Eitt sálarligt spæl, sum als ikki er óvanligt í altjóða fótbóltsheiminum. Ikki minst, tá úrslitini ikki hava verið eftir vild.

Hetta tykist heldur ikki nerva føroyska landsliðsvenjaran, Henrik Larsen, nakað serligt. Tá vit mikudagin hittu hann á máli, helt hann fyri, at hasum mundi Berti Vogts ikki koma nakran serligan veg við.

- Hatta er helst bara ein roynd at flyta fokusið frá sínum egnu trupulleikum yvir á okkurt annað. Tá tað ikki gongst eftir vild, so kanst tú ofta geva øðrum skuldina. Viðhvørt standa dómararnir fyri skotum og onkun tíð veðrið, so hví ikki bara eisini geva vøllinum skyldina?

Skotskir miðlar hava eisini vent sær til Henrik Larsen, fyri at fáa hansara hugsan um hetta, og her hevur landsliðsvenjarin eisini verið greiður í sínari talu.

- Jamen tað er eingin, sum sigur, at landsdystir altíð skulu spælast sama stað. Seinast Føroyar spældu móti Skotlandi spældu vit í Aberdeen. Hví skulu vit so spæla í Glasgow hesaferð. Hatta er tað reina tvætl frá hansara síðu, og annars er vøllurin í Havn ikki endaliga liðugur enn, verður Larsen endurgivin fyri at siga á heimasíðuni hjá BBC Scotland.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Lítið at fegnast um í Johannesburg




*Umboð fyri umhvørvisfelagsskapir og onnur mótmæltu støðuni hjá amerikansku stjórnini, tá amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, fór á røðarapallin í Johannesburg*

**ST-aðalskrivarin heldur kortini, at fundurin um burðardygga menning hevur lagt eina miðvísa kós fyri bardagan ímóti fátækradømi**

BURÐARDYGG MENNING
*Árni Joensen:*

Seinnapartin mikudagin samtyktu ríkis- og stjórnarleiðararnir verkætlanina, sum hevur til endamáls at stríðast ímóti fátækradøminum í heiminum og at verja umhvørvið.

Men tað vóru fá, sum fagnaðu teirri nýggju verkætlanini. Sagt varð, at samtyktin er eitt lítið stig tann rætta vegin, men at heiminum tørvar eitt stórt stig.

Tann 71 síður langa verkætlanin snýr seg m. a. um fátækradømi, eyðkvæmi, vatn og hóttar fiskastovnar, men innihaldið er ikki løgfrøðiliga bindandi.

Umhvørvis- og menningarfelagsskapir, sum vóru á fundinum í Johannesburg, eru alt annað enn nøgdir við tað, sum kom burturúr. Talsmaðurin hjá bretska neyðhjálparfelagsskapinum Oxfram sigur, at úrslitið fer at geva teimum fátækastu nakrar molar á borðið. Norski felagsskapurin ForUM sigur, at verkætlanin er alt ov stuttskygd, og at hon fer ikki at loysa nakrar trupulleikar. Felagsskapurin vil vera við, at tíðin í Johannesburg er burturspilt.

### Bíða við næsta fundi

Kofi Annan, ST-aðalskrivari, sigur seg skilja, at fólk eru vónsvikin, men hann heldur, at fólk høvdu væntað sær ov nógv av fundinum. Aðalskrivarin heldur, at fundurin hevur hóast alt lagt eina kós fyri stríðið ímóti fátækradøminum, og sjálvur heldur hann, at hóast hetta bara er byrjanin, er hetta er týdningarmikil byrjan.

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, sum umboðaði ES í Johannesburg, sigur seg vera nøgdan við úrslitið, hóast alt ikki gekst, sum hann hevði vónað. Danski forsætisráðharrin heldur ikki, at toppfundir sum tann í Johannesburg loysa trupulleikarnar í heiminum, og tí hevur hann mælt ST frá at halda nakran tílíkan fund aftur tey næstu fimm ella tíggju árini.

Norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, sigur, at hansara stjórn hevði sett sær fyri at fáa munandi meiri burtur úr fundinum. Men hóast alt er úrslitið frægari, enn vit stúrdu fyri, sigur Kjell Magne Bondevik.

# Sharon vrakaði donsku friðarætlanina

**Ísraelski forsætisráðharrin vil vera við, at friðarætlanin hjá danska uttanríkisráðharranum er óverulig**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, var mikudagin í Jerusalem og greiddi Ariel Sharon, forsætisráðharra frá teirri nýggju ætlanini, sum skal fáa varandi frið í Miðeystri. Frammanundan hevði hann tosað við fleiri arabiskar leiðarar um uppskotið.

Aftan á fundin segði uttanríkisráðharrin, at ísraelsku leiðararnir høvdu tikið væl ímóti uppskotinum, men hetta var ikki uppfatanin hjá ísraelsku embætismonnunum. Teir vistu at siga, at Sharon hevði vrakað uppskotið.

Í fyrsta lagi kann ísraelski leiðarin ikki góðtaka tann partin av uppskotinum, sum sigur, at palestinar skulu hava sítt egna ríki um trý ár. Tað er óveruligt, sigur Sharon sambært embætismonnunum. Haraftur-at skal Sharon hava sagt, at tað ber ikki til at tosa við palestinska leiðaran, Yasser Arafat, um frið, tí hann forðar fyri øllum tiltøkum, sum bera á tað borðið.

Tíðindini frá ísraelsku embætismonnunum vóru í stórari andsøgn við tað, sum Sharon segði undan fundinum við danska uttanríkisráðharran. Fyrrapartin mikudagin segði hann, at uppskotið bar í sær nakrar møguleikar, sum kundu enda við einari politiskari loysn.

Palestinar taka undir við uppskotinum hjá Per Stig Møller. Eftir ein fund við danska uttanríkisráðharran mikudagin segði Arafat, at uppskotið er sera týdningarmikið – ikki einans fyri palestinar og ísraelsmenn, men fyri alt Miðeystur.

Teir arabisku leiðararnir, sum danski uttanríkisráðharrin hevur tosað við seinastu dagarnar, hava sagt, at uppskotið í sjálvum sær er gott, men teir vænta ikki, at tað kann setast í verk, so leingi ísraelski forsætisráðharrin eitur Ariel Sharon.

## Ætlaði álop sama dag

Skjøl, sum amerikanska sjónvarpið CBS hevur fingið fatur á, avdúka, at Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri gav boð um álop á Irak nakrar fáar tímar aftan á yvirgangsatsóknirnar í New York og Washington tann 11. september í fjør.

Amerikansku trygdartænasturnar vistu tá, at felagsskapurin al-Qaeda var uppi í atsóknunum at World Trade Center og Pentagon, men tænasturnar kundu ikki siga við vissu, at Irak hevði nakað samband við tað, sum var hent.

Men tað ørkymlaði ikki Rumsfeld. Sambært CBS gav hann monnum sínum boð um at fyrireika eitt álop á Irak sum hevnd fyri atsóknirnar í New York og Washington.

## Fiskimenn smugglaðu sigarettir

Løgreglan í Tromsø í Noregi hevur illgruna um, at nakrir menn av einum russiskum trolara royndu at smugla nakrar sekkir við sigarettum mikunáttina.

Tveir menn hjá einum vaktarfelagi sóu, at teir fremmandu fiskimenninir vóru í ferð við at fjala nakrar sekkir á havnarlagnum. Teir boðaðu løgregluni frá, men tá løgreglan kom á bryggjuna, vóru fiskimenninir horvnir. Harafturímóti fann løgreglan sekkirnar, og í teimum vóru 43.600 sigarettir. Samstundis fóru tollarar umborð á tann russiska trolaran, og har funnu teir 15.840 sigarettir afturat.

Løgreglan í Tromsø sigur, at tað eru fleiri ár, síðani myndugleikarnir í býnum hava avdúkað so umfatandi smugling sum hesaferð.

## Útgerð til Kuwait

Amerikanska hervaldið er farið at senda útgerð til Kuwait. Útgerðin skal nýtast í sambandi við eina venjing, sum 2.000 amerikanskir hermenn skulu hava við Persaflógvan.

Amerikanskir fjølmiðlar siga, at hervaldið hevur eisini sent aðra útgerð til Persaflógvan, og at sendingin, sum nú fer avstað, er tann triðja.

Talsmaðurin hjá verjumálaráðnum Pentagon sigur, at útgerðin og venjingin hevur einki við ætlanina at leypa á Irak at gera.

## Heppin í lotto

Ein maður í norska býnum Ramfjorden má sigast at vera sjáldsama heppin í lottospæli.

Seinasta leygardag vann maðurin góðar 3,3 milliónir krónur, og hetta er triðju ferð, at hann hevur vunnið. Ta fyrstu ferðina vann hann góðar 100.000 krónur, og fyri trimum árum síðani vann hann eina góða millión krónur.

Tann hepni vinnarin, sum hevur verið sjálvstøðugur vinnurekandi seinastu 25 árini, sigur, at hann hevur alla tíðina spælt við teimum somu tølunum, og tað ætlar hann eisini at gera í framtíðini. Tað høvdu onnur ivaleyst eisini gjørt.